# ítróttur

Nr. 231 • hósdagur • 4. desmber 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Fýra svimjarar til Oslo

**Suðuroyðar Stevnan varð hildin í Vági um vikuskiftið. Kappingin var samstundis úttøkukapping til Njm**

SVIMJING

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Elida Bjarnadóttir, Aksal Holm Norðfoss, Janus T. Olsen og Helga Djurhuus skulu um vikuskiftið taka lut í Njm. Her eru tey avmyndað saman við landsliðsvenjaranum, Petur Heðin á Fløtti*

Stór svimjikapping var í Vági um vikuskiftið, har átta svimjifeløg við hópin av svimjarum tóku lut.

Kappingin varð samstundis skipað sum úttøkukapping til NM-kappingina fyri juniorar, sum verður í Oslo komandi vikuskifti, og tí var landsliðsvenjarin, Petur Heðin á Fløtti, eisini millum áskoðararnar, soleiðis at hann kundi taka støðu til, hvørji skuldu við til hesa kapping.

Og líkt var eisini til, at svimjararnir kýttu seg eyka nógv av hesum. Í øllum førum vórðu trý bólkamet sett í kappingini, umframt at fimm svimjarar svumu seg til bronsunálina og ein svam seg til silvurnálina.

Fyri at taka tað seinasta fyrst, so var tað Elspa Mørkøre úr Skeggjum, sum svam seg til silvurnálina. Bronsunálina fingu Ruth Smith úr Havnar Svimjifelag, Pál Joensen og Sissal Petersen úr Vágs Svimjifelag og so tveir svimjarar úr Flot. Nevnliga Arnold Davidsen og Remi Langgaard.

Av teimum trimum bólkametunum, sum vórðu sett hesaferð, átti Pauli Ø. Mohr úr Fuglafirði tvey. Hann svam 200 metra frí í tíðini 2.18,6 og 400 metra frí upp á 4.54,7. Eisini setti Elspa Mørkøre úr Skeggjum bólkamet á 100 metra blandaðari svimjing, har hon kom á mál í 1.15,9.

Eftir kappingina varð so eisini avgjørt, hvørjir svimjarar skuldu við til Njm-kappingina í Oslo. Hesi eru Elida Bjarnadóttir, Aksal Holm Norðfoss, Janus T. Olsen og Helga Djurhuus, og skuldu tey ætlandi fara avstað mikudagin.

Samlaða heiðursmerkjabýtið millum feløgini varð annars hetta:

| felag | gull | silvur | bronsu |
|---|---|---|---|
| Havnar Svimjifelag | 51 | 27 | 21 |
| Tvøroyrar Svimjifelag | 21 | 19 | 12 |
| Fuglafjarðar Svimjifelag | 17 | 15 | 9 |
| Flot | 17 | 14 | 7 |
| Skeggjar | 14 | 9 | 9 |
| Ægir | 3 | 7 | 3 |
| Vágs Svimjifelag | 3 | 4 | 14 |
| Reki | 0 | 0 | 0 |

# OddaSTRÍÐ

**Luftin verður full av spenningi, tá kvinnuliðini hjá VÍF og VB hittast í Vestmanna hóskvøldið**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Klokkan hálvgum sjey hóskvøldið verður hondbóltur í Vestmanna. Og ivaleyst eru tað nógv, sum við spenningi bíða eftir hesum.

Tí talan er í nógvar mátar um nógv meira enn bara ein hondbóltsdyst. Tað eru nevnliga kvinnuliðini hjá VÍF og VB sum bresta saman, og umframt at talan er um tvey av oddaliðunum í føroyskum kvinnuhondbólti, so eru hesi bæði eisini júst feløgini, sum hava verið í sentrum, nú útlendingamálið í føroyskum ítrótti hevur rumblað.

## Stórar rembingar

Upprunaliga skuldi dysturin annars verið leiktur tann 15. november, men grundað á alt rumblið, sum tá var kring útlendingamálið, so bað VB HSF um at flyta dystin. Ein umbøn, sum VÍF annars ikki vildi ganga á møti, men sum HSF kortini staðfesti.

Men nú verður dysturin so leiktur, og tað er einki at ivast í, at tað verða tvey topp-tendrað lið, sum nú fara á vøllin. Í Vági halda tey seg í øllum førum hava nakað at prógvað mótvegis VÍF, sum jú var felagið, ið festi í alt rumblið, og hinvegin vilja tey í Vestmanna helst eisini prógva, at tey so sanniliga eisini hava eitt lið, sum kann standa seg í kappingini.

Og so eru tað jú eisini ítróttarligu atlitini. Í løtuni eru liðini ávíkavist nummar tvey og trý á stigatalvuni, og tí verður talan eisini um uppgerð, sum staðfestir, hvat lið fer at kappast við Stjørnuna um fremsta sessin í grundspælinum.

So tað verður spennandi í Vestmanna. Bæði so og so.

## 1. Deild kvinnur

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 8 | 6 | - | 1 | - | 1 | 194 | 148 | 46 | 13 |
| 2 VB | 8 | 6 | - | 0 | - | 2 | 194 | 143 | 51 | 12 |
| 3 VÍF | 8 | 5 | - | 1 | - | 2 | 195 | 169 | 26 | 11 |
| 4 Neistin | 8 | 4 | - | 1 | - | 3 | 211 | 186 | 25 | 9 |
| 5 StÍF | 8 | 4 | - | 1 | - | 3 | 194 | 187 | 7 | 9 |
| 6 Søljan | 9 | 1 | - | 0 | - | 8 | 153 | 214 | -61 | 2 |
| 7 Kyndil | 9 | 1 | - | 0 | - | 8 | 142 | 236 | -94 | 2 |




## Framsýningin í Ribarhúsi í Fuglafirði

**við Rutt og Ester**
**letur upp hósdagin 04/12 kl. 15.00.**

Í hesum sambandi verður fernisering kl. 18.00, har Finnur Hansen v/ fam. syngur.


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** P/F 2672, P/F Lívstryggingarfelagið Føroyar, 100 Tórshavn.

**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Trygvi Fossdal Guttesen, Fjalsgøta 10, 100 Tórshavn (formaður), Gunnar í Liða, Mouritsarvegur 1, 188 Hoyvík og Mortan Poulsen, Lýðarsvegur 4, 188 Hoyvík.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Mortan Poulsen, Lýðarsvegur 4, 188 Hoyvík.

Felagið er tann 31.10.2003, farið í likvidatión við Jógvan Páll Lassen, advokati, Yviri við Strond 4, Box 359, 110 Tórshavn sum likvidator.

*Skráseting Føroya tann 2. desember. 2003.*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3672
**Navn:** Sp/f Glugg
**Hjánavn:** Sp/f Kafe Neystið (Sp/f Glugg)
**Adressa:** R. C. Effersøesgøta 21, 100 Tórshavn.
**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 29.09.2003
**Viðtøkudato:** 29.09.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Georg Eystan Á, Kráargøta 7, 160 Argir.
**Stjórn:** Georg Eystan Á, Kráargøta 7, 160 Argir.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av einum stjóra.
**Grannskoðari:** Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen, J. Paturssonargøta 18, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 29.09.2003 - 31.12.2004
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka matstovu, sølu og annað virksemi í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 2. desember 2003*

*Kristin Balle*


## Brúktir bilar til sølu frá

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

**Citroen Saxo 1.5D**
3. hurðar, km. 115.000, árg. apr 98
**75.000,-**

**Citroen Xsara 2.0HDi SX**
5 hurðar, km. 76.000, árg. jun 00
**135.000,-**

**Citroen Xsara 1.6i stc. Prestige** Km. 7.000, árg. sep 02
**150.000,-**

**Citroen Xantia 1.9TD stc.**
Km. 101.000, árg. dec 98
**120.000,-**

**Ford Focus 1.8TD**
5 hurðar, km. 77.000, árg. aug 99
**135.000,-**

**Kia Sephia 1.5i GLX**
4 hurðar, Km. 75.000, árg. des 96
**55.000,-**

**Honda Civic 1.5i V-tec**
5 hurðar, km. 119.000, árg. jun 96
**80.000,-**

**Mazda 626 2.0TDi**
4 hurðar, km. 79.000, árg. mai 99
**148.000,-**

**Toyota Avensis 2.0 D4-D**
4 hurðar, km. 89.000, árg. feb 01
**175.000,-**

**VØRUVOGNAR**

**Citroen Jumper 2.5TD LH**
Km. 120.000, árg. aug 96
**v/mvg 105.000,-**

**Mitsubishi L300 Cosmos 4x4 Van** Km. 106.000, árg. aug 96
**90.000,-**

**Citroen Berlingo 1.9D Van**
1 skj.hurð, km. 60.000, árg. mar 02
**v/mvg 95.000,-**

Møguleiki er eisini at royna nýggjar bilar

*Vælkomin til*
CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Sosialurin 341800



Sosialurin
-tað loysir seg



## Pedagogur/ hjálparfólk

til Dagrøktarskipanina í Nes kommunu.

Til dagrøktarskipanina, sum er normerað til 65 pláss, søkist eftir 1 pedagogi at arbeiða 20 t um vikuna, at byrja 1. februar 2004.

Søkir eingin pedagogur, verður hjálparfólk sett í staðin.

**Arbeiðsuppgávurnar eru m.a. við tilvísing til leiðaran av dagrøktarskipanini:**
- At samskipa virksemið í spælistovuni
- Vitja dagrøktarheimini regluliga

**Vit ynskja at**
- Tú hevur royndir innan dagstovnaøkið
- Kann arbeiða sjálvstøðugt
- Ert virkin, røkin og hevur lætt við at samstarva
- At tú hevur hug og áræði at skapa umstøður, har børnini gleðast, trívast og mennast

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og FKA.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Katrin Poulsen, dagrøktarleiðara, tlf. 448462 / 218462.

Umsóknir saman við prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Nes kommunu í hendi í seinasta lagi 18. desember 2003, kl. 12.00.

**Nes kommuna**



## Dagrøktari

### *Eitt gevandi starv*

Dagrøktari søkist til dagrøktina í Nes kommunu til at byrja 1. februar 2004.

Sum dagrøktari gerst tú partur av einum felagsskapi við børnum og dagrøktarum, sum javnan hittast í spælistovuni. Eisini verður skipað fyri starvsfólkafundi eina ferð um mánaðin og skeiðvirksemi minst eina ferð um árið.

**Vit krevja:**
- At tú ert før/førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt
- At tú hevur hug at ansa børnum í heimi tínum
- At tú ert frísk/frískur og engagerað/ engageraður

Løn sambært sáttmála millum Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðara felag.

Umsóknir skulu vera Dagrøktini í Nes kommunu í hendi seinast 18. desember 2003 kl. 12.00.

Nærri fæst at vita við at ringja á tlf. 448462.

**Nes kommuna**


www.sosialurin.fo




**Ellis- & avlamisheimið í Vágum**

## Sjúkrahjálpari/ heilsuatstøðingur

Eitt starv á fulla tíð er leyst at søkja til setan hálvan januar 2004.

Starvið er skipað í ymsum vaktum.

Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin hevur hug, hegni og førleika at veita brúkaranum eina góða tænastu. Góð samstarvsevni hava stóran týdning.

Umsókn við neyðugum prógvi v.m. verður at stíla til stýrið og senda til heimið áðrenn 21. des. 2003.

Setanartreytir sambært sáttmála millum AHF Almanna- og Heilsurøktarafelagið og Fíggjarmálaráðið.



## Avloysarar fyri pedagogar í farloyvi

Á Sambýlinum á Rúnarvegi 3 í Runavík eru tvey avloysarastørv, hálva tíð, leys at søkja frá 1. januar til 31. desember, ella eftir nærri avtalu.

Størvini vera sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag, lønt stigini 11 - 18 eftir lønartalvu pr. 01.10.03.

Sambýlið er upprættað til 5 menningatarnað fólk, sum eru væl fyri, og uppgávan hjá umsøkjarunum verður sostatt at vegleiða íbúgvarnar í øllum tí, sum tey hava tørv á.

- Tað verður kravt av tær, at tú við tíni pedagogisku vitan kann menna hvønn av teimum, sum búgva í Sambýlinum, til at húsast saman í felagsskapi hvør við annan, bæði til innanhýsis viðurskiftir og í samfelagnum sum heild.
- At tú vil skapa trivna og á ein pedagogiskan hátt tryggjar okkara íbúgvum menningarmøguleikar, soleiðis at teir koma í fyrstu rekkju, og saman við íbúgvunum finnur útav, hvussu innihaldið í dagligdegnum skal virka. Somuleiðis er tað av týdningi, at tú hevur vilja til at samskifta við okkara avvarðandi og tey, sum vit umgangast dagliga.
  Sambýlið bleiv fyri einum ári síðani upprættað av nýggjum, og kunnu vit bjóða tær eitt spennandi arbeiði við nógvum avbjóðingum, bæði persónliga og fakliga.

Arbeiðstíðin er 20 tímar um vikuna, skiftandi vaktir + vikuskiftir og halgidagar.

Eru nærri spurningar til starvið, kunnu tit venda tykkum til Oddfríðu Højgaard leiðara á tlf. 226121

Ert tú áhugað/ur, so send eina umsókn við avriti av prógvum, viðmælum v.m. innan 17. desember 2003

Umsóknir skulu stílast til:
**Sambýlið á Rúnarvegi**
**ATT: Leiðarin**
**Rúnarvegur 3**
**FO-620 Runavík**